

## STUÐULSFÓLKASKIPANIN FYRI BØRN SØKIR EFTIR STARVSFÓLKI TIL STREYMOYAR OG EYSTUROYAR ØKI

### AVLOYSARAR FYRI STARVSFÓLK Í FARLOYVI

Søkt verður eftir 2 námsfrøðingum sum avloysarar fyri starvsfólk, sum í løtuni starvast í toymi við børnum við autismu í Eysturoynni. Arbeitt verður eftir skúlatíð heima hjá børnunum til kl. 17.30.

Tímatalið er 25 tímar um vikuna.

### NÁMSFRØÐINGAR

Søkt verður eisini eftir námsfrøðingum at avloysa starvsfólk, sum í løtuni starvast í toymi í Tórshavn. Arbeitt verður eftir skúlatíð heima hjá børnunum.

Tímatalið er 23 og 25 tímar um vikuna.

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Um námsfrøðingur ikki søkir starvið, verður hjálparfólk sett í størvini.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast til: Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Argjaboðagøta 7, 160 Argir.

Umsóknarfreistin er 6. januar 2009.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Stuðulsfólkaskipanina á tel. 353570

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

stuðulsfólkaskipanin fyri børn

KREA

## Til fyribilsskattaskránna 2009

www.taks.fo

**Leiðbeinandi virðini á fríum ágóðum o.ø. fyri inntøkuárið 2009:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| a. | **Virði á fríum bústaði, sí viðmerking** kr./m² | kr. | 881 |
| b. | **Eginnýtsla, sí viðmerking** | | |
| | el | kr. | 8.400 |
| | olja | kr. | 21.500 |
| | telesamskifti | kr. | 5.000 |
| c. | **Frí vørunýtsla, sí viðmerking** | | |
| | Bakarar | kr. | 4.900 |
| | Bakarar við Keypmansvørum | kr. | 12.700 |
| | Keypmenn | kr. | 15.500 |
| d. | **Virði á fríum kosti pr. dag, sí viðmerking** | | |
| | 3 máltíðir | kr. | 57 |
| | 2 máltíðir | kr. | 43 |
| | 1 máltíð | kr. | 31 |
| e. | **Virði á fríum bili (persónbilur/stationcar), sí viðmerking** | | |
| | 1100 kg og undir | kr. | 55.400 |
| | 1101 kg til 1300 kg | kr. | 66.900 |
| | 1301 kg til 1500 kg | kr. | 77.500 |
| | 1501 kg og meira | kr. | 89.700 |
| f. | **Vøruvognar** | 60% av ásetta virðinum | |
| g. | **Bussar upp til 10 persónar sum verða nýttir til hýruvognskoyring, sí viðmerking** | kr. | 18.500 |
| h. | **Eginnýtsla av bili hjá hýruvognsførarum:** | kr. | 18.500 |

Upphæddirnar eru íroknaðar meirvirðisgjaldi

Aðrar upphæddir :

**Goodwill-virðisáseting:**

| | | |
|---|---|---|
| Virkisognarrenting | | 7,25% |
| Kapitalisering | | 12,25% |
| Kapitalpensjónsfrádráttur | kr. | 50.600 |
| Donsk lesandi | kr. | 71.000 |

**Til a**
Roknað verður við einari upphædd, sum er fyri bústaðarøkið, ið viðkomandi hevur ræðisrætt yvir. Kjallari og loft, sum ikki eru innrættað og hjallur og bilhús koma ikki undir hugtakið bústaðarøki.

**Til b, c og d**
Privatur vinnurekandi skal skattast av virðinum á vørum og framleiðsum, sum hann tekur úr virki sínum at nýta ella at hava í húsarhaldi sínum, ella til gávur. Virðið verður roknað eftir keypsvirðinum ella framleiðsluvirðinum á hesum vørum.

Somuleiðis skal privatur vinnurekandi skattast av tí partinum av útreiðslunum, sum svarar til eginnýtsluna, t.d. bil, telefon, ljós og hita, har útreiðslurnar um¬fata bæði privatu og vinnuligu nýtsluna.

Meginreglan er tann, at skattgjaldarin sjálvur skal meta um, hvussu nógv er privat, og hvussu nógv er vinnulig nýtsla. Metingin skal vera við atliti til støðd á t.d. húsi og húski.

**Til e og f**
Upphæddirnar eru galdandi fyri bilar skrásettir sum persónvognar smb. § 3 í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum. Fyri vøruvognar eftir § 4 í somu lóg verður virðið sett til 60% av upphæddini.

TAKS kann krevja avrit av skrásetingarskjalinum fyri bilin.

TAKS